# Ide Møblar keypt grannaogn

**Herfyri keypti Ide Møblar ognina hjá Sjúrði Sivertsen, sum liggur beint yvir av handilsbygningunum hjá Ide Møblum á Hálsi. Birgir Andreasen, stjóri í Ide Møblum, sigur, at keypið er ein íløga í framtíðina**

HANDILSLÍV
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Ognin, sum Ide Møblar hevur keypt, er 2400 fermetrar til støddar, og á ognini stendur ein bygningnur, sum er umleið 600 fermetrar stórur. Sjúrður Sivertsen hevur sjálvur lastbilavirksemi á ognini í løtuni, men 1. septembur komandi ár skal økið og bygningurin verða ruddað.

## Ongar beinleiðis ætlanir

Birgir Andreasen sigur, at Ide Møblar er ein fyritøka í framgongd, og tí er altíð neyðugt at hava eyguni eftir, hvørjir møguleikar eru fyri framman.

- Hetta er ein ogn, sum liggur beint yvir av handlinum hjá okkum á Smyrilsvegi, og tí síggja vit tað sum ein møguleika fyri víðkan av virksemi okkara í framtíðini. Í løtuni hava vit ongar beinleiðis ætlanir við ognini, men vit síggja tað meira sum eina íløgu í framtíðina, sigur Birgir Andreasen.

Stjórin í Ide Møblum sigur, at hóast bygningurin, sum í løtuni stendur á ognini, bæði er í minna og lagi og í ringum standi, so eru nógvir møguleikar við ognini.

- Økið er 2400 fermetrar stórt, og tað merkir, at vit kunnu hava ein bygning, sum er 1200 fermetrar stórur og í tveimum hæddum, so at vit tilsamans hava 2400 fermetra gólvvídd. Hetta kann gerast við at byggja afturat verandi bygningi, sum so eisini skal hava eina stóra umvæling, sigur Birgir Andreasen.

## Stórur eftirspurningur eftir slíkum ognum

Ein avtala er gjørd millum Ide Møblar og Sjúrð Sivertsen um, at gamli eigarin sleppur at verða verandi á ognini fram til 1. september komandi ár. Tá yvirtekur Ide Møblar endaliga ognina, og tá skulu bæði bygningur og øki verða ruddað.

- Vit hava tískil eitt ár at umhugsa okkum í, hvat vit vilja við nýggja møguleikanum, men tað er heilt víst, at bygningurin kemur ikki at standa tómur. Vit fara at fríðka bygningin, men hvat slag av virksemi verður í honum, vita vit ikki enn. Tað kann bæði verða handilsvirksemi ella goymsluvirksemi, sigur Birgir Andreasen.

Hann leggur afturat, at slíkar ognir eru nógv eftirspurdar, og at handilsøki á Hálsi ivaleyst er mest eftirspurda handilsøki í landinum í dag. Tí heldur Birgir Andreasen eisini, at talan er um eina góða íløgu, sum Ide Møblar hava gjørt.

Spurdur um keypsprísin, sigur Birgir Andreasen, at tað hava hann og seljarin gjørt eina avtalu um ikki at upplýsa.



*Birgir Andreasen og konan Elsebeth hava eitt ár at umhugsa, hvat slag av virksemi ið tey kunnu hava í gamla bygninginum hjá Sjúrði Sivertsen beint yvir av Ide Møblum. Bygningurin er keyptur, og 1. septembur komandi ár skal gamli eigarin hava ruddað bæði øki og bygningin, og tá verður endaliga yvirtøkan*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Starv í Føroya Banka**




**Íløguráðgevi til Føroya Banka**

Vit leita eftir ráðgeva til íløguøkið. Fremsta avbjóðingin er at veita kundum okkara ráðgeving um bestu loysnina innan hetta øki.

**Arbeiðsøki**
Sum íløguráðgevi við handilsborðið, fært tú møguleika fyri at nýta førleikar tínar innan:

- Partabrøv
- Lánsbrøv
- Virðisbrævarøkt
- Gjaldoyra
- Váðastýring

Herumframt skalt tú luttaka virkin í uppsøkjandi kundaarbeiðinum í sambandi við íløgur og ikki minst innanhýsis virksemi.



Í øðrum lagi ert tú vælkomin til at geva kunning/frálæru til starvsfelagar tínar á íløguøkinum.

Vit arbeiða við einari miðvísari vakstrarætlan við nógvum nýggjum handilsvirksemi innan íløguøkið. Tú fert at arbeiða í einum toymi við dugnaligum og virkisfúsum starvsfeløgum.

**Førleikakrøv**
Vit vænta at tú:

- Hevur viðkomandi útbúgving, búskaparfrøðingur er ein fyrimunur
- Hevur hollan kunnleika til íløguráðgeving
- Er útvendur, ágrýtin og kveikjandi
- Er góður toymisleikari
- Sær møguleikar, og megnar at útinna teir í verki

Vit leggja dent á, at tú ert førur fyri at arbeiða skjótt í sambandi við marknaðarbroytingar.

**Løn og setunarviðurskifti**
Verða avtalað nærri sambært útbúgving og royndum.

**Umsókn**
Send tína umsókn við CV til: Føroya Banki, Húsagøta 3, FO-100 Tórshavn, att: Bjarki Mohr, ella á teldupost **starvsfolk@foroyabanki.fo** áðrenn 1. desember 2005.

**Meira kunning**
Meira fæst at vita um starvið við at seta teg í samband við leiðaran fyri íløguøkið, Jan Jakobsen á tlf. 311350, teldupostur **jan.jakobsen@foroyabanki.fo**, ella Bjarka Mohr á 319937, teldupostur **bjarki.mohr@foroyabanki.fo**.

FØROYA BANKI
www.foroyabanki.fo